# Fáa uppí 3 kr. minni fyri toskin í Klaksvík

**Á Uppboðssøluni í Klaksvík hava teir veitt eina eyka tænastu fyri útflytarar, nú verkfall er. – Hetta hevur verið við til at hildið prísunum uppi, sigur Kristian Fríðrik Olsen, leiðari**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Tað er rætt, sum sagt hevur verið av útróðrarmonnum í Klaksvík, at fiskaprísirnir á Uppboðssøluni har norðuri einstakar dagar hava verið væl lægri enn á Uppboðssøluni á Toftum. Orsøkin er, at eingin fiskur verður fluttur um Leirvíksfjørð, nú verkfall er, og tí eru færri keyparar til fiskin enn vanligt.

Í so máta er Klaksvíkin við ongum farmaflutningi meira avbyrgd enn meginøkið annars.

Kristian Fríðrik Olsen, leiðari, sigur, at tað hevur gingið rímiliga væl at hildið prísunum uppi og á sama støði sum á Toftum, men einstakar dagar hevur munurin á toskinum verið upp í einar 3 krónur fyri kilo.

– Eg vil siga, at prísirnir hava verið á góðari leið – undantikið nakrar ávísar dagar, og teir hava sum heild verið væl betri enn fyrr í vár. Ikki minst prísurin á toski.



*Onkran dagin hava skip og bátar fingið uppí 3 krónur minni fyri kilo av toski á Uppboðssøluni í Klaksvík enn á Toftum*

## Færri keyparar

Kristian Fríðrik vísir á, at Kósin hevur havt nógvan fisk í seinastuni, tí nógvur fiskur er komin uppá land í Klaksvík.

– Hetta hevur ført til, at áhugin fyri útróðrarfiskinum hevur verið minni, og tað hevur eisini ávirkað fiskaprísin á gólvinum, har útróðrarfiskurin verður seldur.

Spurdur, hvørjir keypararnir í Norðoyggjum eru, sigur Kristian Fríðrik, at tað í fyrsta lagi er Kósin, Sammut, Pure Water, Norðfra í Hvannasundi og Norðurfisk í Árnafirði.

– Vit hava eisini útflytarar, sum keypa fisk her norðuri og senda hann feskan og ísaðan av landinum, men hesir eru meira skerdir, nú eingin flutningur er millum oyggjarnar.

Á uppboðssøluni í Klaksvík hava teir í seinastuni veitt eina eyka tænastu fyri útflytarar, og hetta hevur verið gjørt fyri at halda prísunum uppi.

– Vit hava koyrt fisk, sum útflytarar úr øðrum økjum í landinum hava keypt, í bingjur, sum síðan eru sendar av landinum. Hetta hava vit ikki stundir at gera vanliga, men hava veitt hesa tænastu, nú minni fiskur er farin um uppboðssøluna og nakað minni hevur verið at gjørt á Uppboðssøluni enn vanligt.

Kristian Fríðrik sigur, at tað serliga er fiskurin hjá trolbátunum og hýsan hjá línu- og útróðrarbátunum, sum er farin av landinum seinastu tíðina.

– Toskurin hevur sum sagt havt væl betri prís í seinastuni enn fyrr í vár, meðan trupult hevur verið at fingið hampiligan prís fyri smáu hýsuna. Teir, sum keypa fisk til útflutnings, hava lyft prísin á smáu hýsuni uppeftir, sigur hann.

## Eingin fiskur stendur eftir

Leiðarin á uppboðssøluni í Klaksvík vísir á, at tað er ikki, fyrr enn trot er á fiski, at tú sært, hvør veruligi fiskaprísurin er.

– Og trot hevur ikki verið á fiski í longri tíð,sigur hann.

Kristian Fríðrik sigur, at Uppboðssølan í Klaksvík eisini hevur verið rakt av troti á íløtum, kørum og kassum, og hetta hevur ikki gjørt tað lættari.

– Sum heild, kunnu vit siga, at tað hevur gingið hampiligt at selja fiskin fyri líkinda prís, síðan verkfallið byrjaði, og higartil hevur eingin fiskur staðið eftir, sigur Kristian Fríðrik Olsen.

# Eingin tók ferðasambandið uppá tungu

SAMFERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Gamal siður er, at politisku flokkarnir skipa fyri politiskum fundum í ávísum bygdum kring landið undan hvørjum vali, og hetta er eisini siður í Nólsoy. Men fleiri nólsoyingar, sum vóru á einum slíkum veljarafundi í Nólsoy sunnudagin, fóru vónsviknir heim aftur til húsa.

– Tosað varð um alt millum himmal og jørð, men ikki eitt einasta eitt valevni nevndi umstøðurnar hjá okkum, nú verkfall er, og eingin sigling er um Nólsoyarfjørð.

Nólsoyingar, sum hava vent sær til Sosialin, siga, at hvønn morgun og hvørt kvøld ferðast einir 30-40 nólsoyingar um fjørðin til arbeiðis og í skúla.

– Nú verkfall er, og líkindini at ferðast ímillum við smábátum ikki eru nakað serlig, er støðan ótolandi.

Víst verður á, at fleiri, sum arbeiða í Havn, eru mammur, sum eiga børn í Nólsoy, og tær vita ikki, tá ið tær fara til Havnar um morgunin, um tær sleppa útaftur til børnini um kvøldið.

– Tað verður so nógv tosað um bygda- og økismenning. Tí er tað ófatiligt, at ikki eitt einasta valevni á einum tílíkum politiskum fundi, tekur samferðsluna uppá tungu, men heldur velja at møsna um KT-tøkni og onnur háfloygd viðurskifti, sum er tað reina vrøvl fyri okkum undir slíkum umstøðum.




*– Samferðslan er okkara lívsæðr til meginøkið, og tað er ófatiligt, at politikarar og valevni annars ikki skulu taka hesar umstøður uppá tungu, siga vónsviknir nólsoyingar*

Nólsoyingar vísa á, at fleiri ferðir seinastu árini hevur samferðslan ligið lamin orsakað av verkfalli, og hetta er hvørja ferð eitt harmarslag í sjálvt lívsgrundarlagið hjá fólki, sum búgva á útoyggj.

– Samferðslan er okkara lívsæðr til meginøkið, og tað er ófatiligt, at politikarar og valevni annars ikki skulu taka hesar umstøður uppá tungu við eitt slíkt høvi, har tey biðja um okkara stuðul at verða vald at stýra landinum.

Nólsoyingar stúra fyri, at verkføllini seinastu árini, sum ferð eftir ferð hava lagt samferðsluna lamna, fara at føra til, at fleiri og fleiri fara at umhugsa at flyta inn á meginøkið at búgva.

– Er hesin tankin fyrst farin at nala í fólkinum, er vandi fyri, at hann mennist og gerst veruleiki, soleiðis sum umstøðurnar eru hjá okkum, sum búgva her úti, siga vónsviknir nólsoyingar.



# Høvuðsstaðurin fjakkar heilt nógv

**Síðani 1966 hevur eingin flokkur verið størstur í største valdøminum meiri enn tvær ferðir upp í slag, og persónliga atkvøðutalið hjá Høgna Hoydal fyri fýra árum síðani var tað hægsta, sum nakar nakrantíð hevur fingið á einum løgtingsvali**

Í hesi vikuni hevur Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur, skrivað um val og valtøl í valdømunum. Vága valdømi og Suðuroyar valdømi verða umrødd í blaðnum týsdagin, sum er valdagurin


*Kvinnur í politikki: Ingrid Sondum, Jona Hendriksen og Karin Kjølbro. Jona Hendriksen er fyrsta kvinna, sum hevur havt fast sæti á tingi. Hon kom inn fyri Jákup Lindenskov valskeiðið 1974-78, tá hann var landsstýrismaður. Í 1978 varð hon vald á ting fyri Javnaðarflokkin og Karin Kjølbro fyri Tjóðveldisflokkin. Ingrid Sondum hevði fleiri ferðir sæti á tingi sum varafólk umboðandi Tjóðveldisflokkin*

## SUÐURSTREYMOY

Ein stórur triðingur av fólkinum býr í høvuðsstaðarøkinum. Tí sigur tað seg sjálvt, at fyri samlaða úrslitið av valinum hevur tað alstóran týdning, hvussu valið hilnast í Suðurstreymoyar valdømi.

Undir krígnum og fram til og við valinum í 1954 var fólkaflokkurin størstur í valdøminum. Síðani tá hevur tað verið eitt sindur upp og niður hjá Fólkaflokkinum og øllum hinum stóru flokkunum. Fyri undirtøkuna hjá Fólkaflokkinum var tað ein smeitur fyri undirtøkuna, at Kjartan Mohr, sáli, stillaði upp og varð umdømisvaldur í 1954. Á valinum í 1958 bjóðaði Kjartan Mohr seg fram í nýstovnaða Framburðsflokkinum, og hann átti sessin so leingi, sum hann var á livið. Í 1980 vann Juul Jacobsen í Nólsoy eykavalda sessin. Turbolensurin og skifti frá Kristiliga Fólkaflokkinum og til Miðflokkin hevði broytingar í manningini við sær. Tordur Niclasen varð valdur i Suðurstreymi, inntil hann í 1990 flutti í Eysturoyar valdømi. Síðani 1994 hevur Jenis av Rana verið eykavaldur í Suðurstreymi og politiski leiðarin í Miðflokkinum.

Suðurstreymoyar valdømi átti inntil 1978 fýra umdømisvaldar tingmenn. Síðani hevur valdømið átt átta umdømisvaldar. Og stóra fólkatalið hevur havt við sær, at valdømið altíð hevur havt eykavaldar tingmenn.

## Ólíkur øðrum londum

Tey seinastu árini hava javnaðarflokkarnir nógva staðni mist takið á høvuðsstøðunum – bæði í valunum til lóggávutingini og á kommunuvalunum. Í europeisku ídnaðarsamfeløgunum var tað annars vanligt, at sosialdemokratisku flokkarnir vóru størstir í høvuðsstaðnum, og at teir eisini áttu borgarstjórarnar. Føroyski Javnaðarflokkurin hevur ongantíð havt takið á høvuðsstaðnum. Síðani kríggið hevur hann bara eina ferð verið størstur í Suðurstreymi (tá rokna vit við, at atkvøðurnar hjá Zacharias Wang í 1974 vóru tjóðveldisatkvøður). Javnaðarflokkurin var størstur í Suðurstreymi í 1990. Tað var ta ferðina, at formaður floksins síðani 1970, Atli P. Dam, flutti úr Suðuroyar valdømi og til høvuðsstaðin og fekk bestu persónligu undirtøkuna, sum nakar hevði fingið inntil tá.

Á valinum í 1994 misti Javnaðarflokkurin meiri enn helmingin av atkvøðunum, sum hann hevði havt, og Atli P. Dam misti tingsessin. Marita Petersen, sáli, sum tá var floksformaður og løgmaður fekk einasta javnaðarsessin.

Síðsta dømið um, at Javnaðarflokkurin ikki hevur tað so gott í høvuðsstaðnum, var á fólkatingsvalinum í november. Tá øll valstøðini vóru tald uttan høvuðsstaðurin, lá Javnaðarflokkurin til at fáa annan mannin, men tá úrslitið úr Havnini varð lagt afturat hinum, hevði Tjóðveldisflokkurin lyft seg upp um Javnaðarflokkin.

Jacob Lindenskov hevur verið drúgvastur sum javnaðartingmaður í Suðurstreymi. Frá tí at hann sum blaðungur kom á ting í 1958, sat hann inntil í 1990. Undantakið var valskeiðið 1966–1970, tá Martin Joensen púra óvæntað tók sessin.

Á valinum fyri fýra árum síðani lyfti Javnaðarflokkurin í høvuðsstaðnum seg nakað uppaftur eftir katastrofuvalið í 1994, men hann var framvegis undir miðaltalinum fyri alt landið. Um hann hevði havt megnað miðal undirtøkuna í hinum valdøminum, so hevði hann verið størsti flokkur. Tí er tað neyvan ov nógv sagt, at Javnaðarflokkurin hevur ein trupulleika í høvuðsstaðnum.

Kristian Magnussen, sum í 1994 varð valdur fyri Verkamannafylkingina, fór undan valinum í 1998 upp í Javnaðarflokkin, og hann var valdur sjálvur annar. Hitt umboðið eigur Katrin Dahl Jacobsen.

## Seinnu gullárini hjá Fólkaflokkinum

Undir krígnum og fram inntil kreppuárini fyrst í fimmti árunum vóru nógv kend nøvn á fólkaflokslistanum – Jóannes Patursson, Thorstein Peteresen og Richard Long.

Í 1954 varð Richard Long óvæntað valdur. Thorstein Petersen varð ikki valdur á serlista, og Richard Long vann sessin frammanfyri Óla Jákup Jensen, sum var uppstillaður sum nummar eitt og harvið fekk hjálp frá listaatkvøðunum. Men tað rakk ikki hjá honum.

Tiltikið er tað, tá Sigfried Skaale í 1962 vann umdømisvalda sessin hjá Fólkaflokkinum. Hann var uppstillaður sum nummar trý og fekk fleiri atkvøður enn Knút Wang og Petur Christiansen fingu saman við listaatkvøðunum. Á tí valinum var Sigfried Skaale einasti umdømisvaldi tingmaðurin hjá fólkaflokkinum, sum í alt fekk seks tingmenn.

Knút Wang var blaðstjóri á Dagblaðnum, hann var tingmaður í fleiri skeið, men í 1974 fall hann fyri Óla Breckmann, sum síðani hevur umboðað valdømið og sum hevur havt ábyrgdina av Dagblaðnum. Í 1978 flutti Jógvan Sundstein úr Eysturoy og í Suðurstreym, og m. a. stóra kappingin millum Óla og Jógvan hevði við sær, at atkvøðutalið øktist støðugt frá 1974 og fram til 1988, tá flokkurin fyri fyrstu ferð síðani 1945 fekk tríggjar umdømisvaldar tingmenn í valdøminum.

Á valinum fyri fýra árum síðani fingu Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin í Suðurstreymi nett sama atkvøðutal – 2.072. Ta ferðina fingu báðir tveir umdømisvaldar tingmenn. Um tað fer at standa á jøvnum hesa ferð, so er tað ikki ómøguligt, at tað verður neyðugt við lutakasti um áttanda umdømisvalda tingmannin.

## Upp og niður hjá sambandinum

Søguliga hevur Sambandsflokkurin ikki havt gott tak á Suðurstreymoyar valdømi. Eyðkennið fyri úrslitini hjá honum hevur verið, at hann hevur verið óstøðugur. Trygvi Samuelsen var høvuðsumboðið hjá flokkinum í valdøminum frá krígsárunum. Á valinum í 1974 fall hann. Tá varð Pauli Ellefsen einasta løgtingsumboðið hjá sambandinum í Suðurstreymi. Hann gjørdist beinanvegin formaður, og teir fingu takið á høvuðsstaðnum. Sambandsflokkurin var størstur inntil valið í 1984. Eftir løgmansskeiðið hjá Paula Ellefsen datt Sambandsflokkurin í Suðurstreymi niður á fjórða plássið, og síðani varð hann ikki størstur aftur fyrrenn í 1994.

Á kreppuvalinum í 1994 fekk Sambandsflokkurin trý umboð. Tað var fyrsta og higartil einasta ferðin, at flokkurin hevur átt so dygga umboðan í Suðurstreymi. Bjørn á Heygum og Finnbogi Arge vóru ódrúgvir, meðan Lisbeth L. Petersen endaði sum floksformaður.

Fyri fýra árum síðani fekk Sambandsflokkurin bara ein umdømisvaldan í Suðurstreymi. Kappingin um plássið aftanfyri Lisbeth L. Petersen var ikki stór. Heðin Mortensen var eykavaldur við 201 atkvøðum, og landsstýrismaðurin Eilif Samuelsen fekk 102 atkvøður á triðja plássinum. Hann er ikki á listanum hesa ferð, men fleiri valevni, sum hava staðið seg væl á býráðsvalunum, bjóða seg fram.

## Høgni størstur

Á valinum í 1998 varð